# Hesa vikuna bjóða vit hesa matskrá:



## Forrættur
Hummari og dampað síl, borðreidd á broysknum salati við basilikum-sitrón dressingi

## Høvuðrættur
Lamba filet við panadu av hvítleyki, hasselnøtum og timian, á soppasauté og lambasoði

## Dessert Merlot
Lætt fryst sjokolátakøka, borðreidd við ísi og fríska ri frukt

2 rættir Kr. 305,-
3 rættir Kr. 345,-

Sjónband 317774

RESTAURANT MERLOT

Vælkomin

Magnus Heinasonargøta 20
FO-100 Tórshavn
Tel (+298) 311121 - Mobile (+298) 214121

# Starv á lønarstovuni á Føroya Gjaldstovu

Gjaldstovan hevur um hendi Landsroknskapin, Búskaparskipan landsins, og ein stóran part av almenna bókhaldinum. Á Gjaldstovuni arbeiða 32 fólk.

Kjarnin í Búskaparskipan landsins er Oracle Financials. Av øðrum skipanum kunnu verða nevndar: Felags lønarskipan, Búskettskipan, Leiðslukunningarskipan og Dátuvøruhús.

- Lønarstovan hevur um hendi stóran part av almennu lønaravgreiðslunum. Deildin umsitur Felags Lønarskipanina og ráðgevur í at brúka skipanina og nýstovnaðu WEB-løn veitingini.
- Arbeitt verður í løtuni at skipa eina Felags Lønarfyrisiting fyri landið, sum umfram at fyrisita Felags Lønarskipanina fer at fevna um tænastumannaeftirlønir, HR-umsiting og ráðgeving.
- Talan er um góðar arbeiðsumstøður, bæði tá ið ræður um høli og útbúnað. Gjaldstovan hevur eina flekstíðarskipan, og í Fíggjarmálaráðnum eru góð kantinuviðurskifti.

Í løtuni eru 130 brúkarar í Felags Lønarskipanini

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**



**Eitt av starvsfólkum okkara fer í barnsburðarfarloyvi frá 1. juli 2007 til 1. februar 2008 og tí søkja vit eftir fólki at byrja 1. juli ella so skjótt sum til ber.**

**Uppgávurnar eru at:**
- skráseta og málsviðgera lønir
- koyra lønir
- rætta lønir
- bóka lønir
- svara lønarfyrispurningum

Viðkomandi sum situr í starvinum hevur umframt tikið sær av at
- ráðgeva um lønarskipanina
- gera úttrekk úr skipanini
- seta í verk webb-partin av lønarskipanini
- gera úttrekk úr Datavøruhúsi

**Krøv til starvið:** EDV-skipanir stuðla øllum arbeiðinum á gjaldstovuni og tí er tað ein fyritreyt, at tað liggur væl fyri hjá tær at brúka EDV og at seta teg inn í nýggjar loysnir. Ávís útbúgving er ikki kravd, men hevur tú júst lokið HH útbúgvining e.t., so er hetta ein møguleiki. Royndir á lønarøkinum er annar møguleiki. Hevur tú skrivstovuútbúgving/bankaútbúgving er hetta ein upplagdur møguleiki at royna teg á lønarøkinum. Tú skal vera álítandi, røkin og hava góð samstarvsevni.

**Setanarviðurskifti:** Arbeiðstíðin er 39 tímar um vikuna. Starvið er sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett alt eftir útbúgving, royndum og førleika. Meira fæst at vita um starvið frá Guðny Simonsen, sum er at hitta á tlf. 352410 ella 214965.

**Umsókn:** Umsóknir við prógvum og møguliga viðmælum skulu verða send Føroya Gjaldstovu, Traðagøtu 39, Boks 2009, 165 Argir. Umsóknarfreistin er 29. mai 2007.

Dimmalætting

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

- Konsertir
- Fundir
- Framsýningar
- og annað

miðlahúsið í Vágsbotni

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO | Sosialurin



# Fiat Scudo til sølu

Nýsýnaður Fiat Scudo 1.9 TD, árgangur '96.

**Tel 511641**

# Opel Combo til sølu

Ein sera vælhildin Opel Combo 1.6 persónbilur frá juni 2003. Hevur koyrt 53.000 km. Nýggjar 17" alu-felgur/dekk, fjarstýrt sentrallás, el-rútar framman, tokulyktir, radio við fløguspælara, v.m.



**Prísuppskot: 118.000,-**

**Tel 21 19 96**